## Spreinging kravt 30 mannalív

Minst 30 fólk doyðu í einari ógvusligari spreinging í pakistanska býnum Lahore í morgun. Myndugleikarnir siga, at spreingingin var tætt við eina løgreglustøð, og tíðindastovan AP skrivar, at minst 30 fólk eru deyð, og at umleið 80 hava fingið skaða. Eingin hevur átikið sær ábyrgdina av spreingingini, men fólk á staðnum hava greitt frá, at tey hoyrdu fleiri skot beint aftan á spreinginina. Eygleiðarar í Pakistan siga, at spreingingin kann hava samband við átakið hjá pakistanska herinum ímóti Taliban í Swat-dalinum nærhendis afghanska markinum.



## Framvegis kolera í Zimbabve

Kolerasjúkan breiðir seg ikki so nógv í Zimbabwe nú sum fyri nøkrum vikum síðani, men kortini koma framvegis fráboðanir um nýggjar tilburðir. Altjóða Reyði Krossur sigur, at higartil eru 98.309 fólk smittað, og at talið helst fer upp um 100.000 í hesariu vikuni. Næstan 4.300 fólk hava latið lív av kolerasjúkuni í Zimbabwe, síðani hon tók seg upp í august í fjør. Sjúkan var í hæddini í februar ella júst um tað mundið, tá tann nýggja stjórnin hjá Morgan Tsvangirai, forsætisráðharra tók við og setti fleiri tiltøk í verk fyri at fáa tamarhald á sjúkuni.

# Rørsla skal vera náttúrlig

**Rørsla skal vera ein náttúrligur partur av gerandisdegnum. Tað er motto'ið hjá ítróttarbarnagarðinum á Svangaskarði, sum er tann einasti av sínum slag í Føroyum. Tað ósunnasta, tey fáa á dagstovninum, eru bollar**

RØRSLA
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*

Tað er umráðandi at venja børn við rørslu frá ungum árum, um rørsla skal gerast náttúrligur partur av gerandisdegnum hjá børnum. Hetta hevur einasti føroyski ítróttarbarnagarður gjørt álvara av, og syrgir fyri at børnini á dagstovninum hvønn dag eru virkin. Og fyri tað mesta gongur tað fyri seg uttandura. Ítróttarbarnagarðurin heldur til í gamla B68 húsinum á Svangaskarði, har 55 børn ganga, og 13 starvsfólk hava sína dagligu gongd.

- Hugskotið kom av at leiðarin hjá okkum (sum er burturstødd í løtuni red.), hevði ítrótt á linju. Tá stovnurin so lat upp í 2002, var arbeiðssetningurn at rørsla skuldi vera ein náttúrligur partur av gerandisdegnum hjá børnum, greiðir varaleiðarin, Julianna á Geilagarði frá.

Við at hava en ítróttarbarnagarð, verður grundarlagið undir einum fysiskum aktivum gerandisdegi lagt. Tá Sosialurin í gjár var framvið, stóðu súkklur í hópatali uttan fyri dagstovnin. Orsøkin var, at ítróttarbarnagarðurin hevði hjóldag, sum tey hava annanhvønn týsdag. Hjóldagar súkkla børnini, standa á rulluskoytum ella á rennihjóli.

- So nýta vit vøllin her til at gera banar, vit renna og sparka, og eru í heila tikið úti tað mesta av tíðini. Tveir dagar um vikuna eru vit í fimleikarhøllini, og ein dag um vikuna hava vit svimjihøllina. Í gjár høvdu vit so ein innidag, men tað tímdu tey einki serliga væl, tí tey eru so von við at vera úti, sigur varaleiðarin.

Á Svangaskarði er eingin ferðsla, og tað er stutt úr barnagarðinum niðan í hagan. Skamt frá barnagarðinum liggja tvær tjørnir, sum børnini vitja, tá veðrið er til tað. Hvønn dag er frukt á skránni, og hvønn morgun hava børnini samling, har tey spæla rørsluspøl.

- So hava vit havt vitjanir av fimleikalærarum, heilsumálaráðharranum og einum kostráðgeva, sum eru komin við íblástri til góðar vanar á stovninum, sigur Julianna á Geilagarði.

Onkuntíð skulu børnini fáa okkurt lekkurt. Og tað hendir, tá føðingardagur er. Annars er bollar tað ósunnasta kokkurin kann finna uppá at gera til børn og starvsfólk á ítróttarbarnagarðinum á Svangaskarði.




*Súkkluhjálmar er krav, tá hjóldagar eru*





*Myndir: Jens Kristian Vang*